# Smyril sigla ímillum Føroyar og Skotland við fiski

**Heldur enn at selja Smyril fyri lítið og lætt, eigur landið at seta hann í uttanlandssigling ímillum Suðuroy og Skotlands við fiski, halda útflytarar**




*Smyril skal ikki seljast. Tvørturímóti eigur hann at verða settur í fasta sigling ímillum Føroyar og Skotland við fiski, halda fiskaútflytarar*

FISKAFLUTNINGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Smyril eigur ikki at verða seldur. Tvørturímóti eigur hann at verða brúktur at sigla við fiski ímillum Føroyar og umheimin.

Tað halda fólk í fiskivinnuni í Føroyum.

Nú nýggjur Smyril kemur næsta ár, ætlar landsstýrið at selja Smyril sum nú er.

Mett verður, at hann kann seljast fyri einar seks milliónir, men summi meta, at so nógv fæst ikki fyri hann.

Undir øllum umstøðum er talan um upphæddir, sum landskassin hvørki livir ella doyr av.

Samstundis verður mangan ført fram, at skulu vit menna fiskivinnuna í Føroyum, verður neyðugt við munandi betri flutningssambandi ímillum Føroyar og umheimin.

Tí halda fólk í fiskivinnuni í Føroyum, at tað er skeivt at selja Smyril.

Heldur eigur landið at seta hann í sigling við fiski ímillum Føroyar og umheimin.

– Verður Smyril settur í sigling ímillum Suðuroynna og Scrabster við fiski, kann hann sigla minst tveir túrar um vikuna og tað vildi givið føroyingum eina heilt aðra støðu á feskfiskamarknaðinum í Evropa, halda fiskaútflytarar.

**Eitt sera stórt framstig**

Teir halda avgjørt, at tað vildi verið eitt stórt framstig at fingið eina slíka sigling í fastari rutu tvær ferðir um vikuna.

Teir siga, at vit mugu ásanna, at í løtuni er sambandi ímillum Føroyar og umheimin ikki nóg gott, hvat fiskaflutningi viðvíkur.

– Smyril er væl royndir á hesum øki, tí hetta er ein sigling, hann hevur verið í áður og hevur roynst sera væl í.

– Eitt tað største bakkastið fyri føroyska fiskivinnu í longri tíð, var, tá ið Teistin varð seldur og uttanlandssiglingin við fiski hjá Strandferðsluni helt uppat.

iskaútflytarar siga, at síðani hava privatu flutningsfyritøkurnar roynt seg.

– Men vit kunnu bara staðfesta, at tænastan er ikki fullgóð, tí fráferðirnar eru ov fáar og ov ólagaligar – í hvussu so er fyri partar av útflytarunum

Útflytarar leggja leggja afturat, at er fiskurin fyrst komin til Scrabster, eru sera góðir møguleikar fyri víðari flutningi niður til alt Evropa.

Og tað ongin sum sigur, at hann skal sigla tómur heimaftur og hóast Skotland er okkkara næsti granni, er tað ómetaliga lítið, vit flyta inn haðani frá, hóast tað eisini er væl bíligari enn í Danmark.

## Anker í Snarskivuni og Ásla Rannvá í Smiðjuni

Í næstum lata tvær listaframsýningarupp í Havn "Vindurin blæsur, hvar sum hann vil" er heitið á framsýning, sum Anker Mortensen letur upp í forhøllini í Snarskivuni hósdagin 9. desember kl. 16.

Framsýningin er opin til 1. februar í vanligu upplatingartíðini hjá Snarskivuni, mánadag til fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

Í Smiðjuni í Lítluvík er eisini Listaframsýning. Har er tað Ásla Rannvá Svensson, sum sýnir fram.

Men hendan framsýningin er bara opin hetta vikuskiftið.

Hendan framsýningin er opin fríggjadagin frá klokkan 16.00 - 19.00 leygardagin og sunnudagin er opið frá klokkan 15.00 - 20.00.

# Fleiri ferðafólk um flogvøllin í Vágum

**Ferðafólkatalið á flogvøllinum í Vágum økist alsamt**

Í november mánaði í ár hava tilsamans 9.711 fólk ferðast um flogvøllin í Vágum. Hetta er 8,7% fleiri enn í november mánaði í fjør, tá ið talið var 8.936 ferðafólk, sigur flogvøllurin í tíðindaskrivi.

Fyrstu 11 mánaðarnar, frá januar til november í ár, hava 156.564 fólk ferðast um flogvøllin. Hetta er 2,3% fleiri enn sama tíðarskeið í fjør, tá tilsamans 153.073 fóru og komu um flogvøllin.

Høvuðsfarleiðin er enn sum áður, rutan ímillum Føroyar og Danmark.

À Danmarkarrutuni er vøksturin í ferðafólkatalinum higartil í ár 5,4%.

Men á rutunum til Íslands og Stórabretland er harafturímóti talan um eina minking upp á ávikavist 1,3% og 27,8%.

Í november í ár hava verið tilsamans 376 komu og fráferðir og tað eru 5,1% færri enn í november í fjør. Men taka vit alt árið í ár, eru komin og farin higartil, 4.646 flogfør.

Hetta er ein minking uppá 4,9% í afturímóti í fjør.

Fyribilstølini fyri post og farm annars, vísa, at í november í ár vóru 23,8 tons av farmi flutt loftvegis móti 35,4 tonsum í november í fjør. Hetta er ein minking upp á 32,8%.

Flogposturin hevur eisini verið fyri afturgongd svarandi til 10,0%, frá 53,0 tonsum í november í fjør til 47,7 tons í november í ár.

Ein frágreiðing til hetta kann vera, at orkuføri til post og farm hevur verið minni, nú bert eitt flogfelag røkir hesa tænastuna.